Ólafur Ragnar Grímsson, ein eldsál ikki bara fyri Ísland men eisini fyri Arktis, her á stóra palli á Arctic Circle í Reykjavík. Myndir Jan Müller

Løgmaður á pall og til háborðs við Hollande og Grímsson

Jan Müller

22.10.2015 - 14:46

Oljan.fo

Stóra ráðstevnan Arctic Circle í Reykjavík er av á hesum sinni. Aksel Johannesen, løgmaður var millum leiðandi røðararnar saman við m.a. forsetunum í Íslandi og Fraklandi.

Teir tríggir stjórnarleiðararnir høvdu allir framløgur á sjálvum høvuðspallinum á ráðstevnuni, sum varð í Hørpuni. Meðan løgmaður umboðaði eina ta minstu tjóðina í Arktis og gjørdi vart við okkara framtíðar leiklut í arktiska økinum, so luttók Hollande sum heiðursgestur á ráðstevnuni og sum flaggberi fyri komandi ST veðurlagsfundin, ið verður í franska høvuðsstaðnum París í desember.

Millum mongu tiltøkini á Arctic Circle ráðstevnuni í Reykjavík var eisini døgurði hjá íslendska forsetanum, Ólafur Ragnar Grímsson. Millum gestirnar vóru eisini Aksel Johannesen, løgmaður og franski forsetin Francois Hollande. Og tað vildi so til, at føroyski løgmaðurin kom at sita næstur teimum báðum forsetunum og fekk harvið eisini varpað ljós á Føroyar í Arktis og føroysku luttøkuna á ráðstevnuni.

Hóast Arctic Circle stevnan legði upp til ein dialog um framtíðina í Arktis, so var hon hesaferð lutvíst eisini ein upphiting til komandi týðandi fundin í Fraklandi millum allar heimsins tjóðir um at avmarka CO2 útlátið fyri at forða fyri ógvusligum veðurlagsbroytingum í framtíðini.

Tað var tó fyrst og fremst íslendski forsetin, Ólavur Ragnar Grímsson, sum setti sín heilt serstaka dám á ráðstevnuna, bæði sum undangongumaður og stigtakari og ikki minst sum fyriskipari og fundarstjóri til flestu av stóru tiltøkunum.

Við hesum stóra og týdningarmikla tiltaki í einum av heimsins mest forkunnugu bygningum. Hørpuni, hevur íslendski forsetin av álvara enn einaferð sett Ísland á heimskortið og harvið eisini varpað ljós á Ísland sum eitt av undangongulondunum í Arktis. Eingin ivi er heldur um, at Føroyar við at senda løgmann og so mong dugnalig og framstandandi fólk á ráðstevnuna eisini hevur fingið eyguni hjá mongum við áhuga fyri Arktis upp fyri leiklutinum hjá Føroyum í hesum norðasta heimspartinum.

Hildnar vóru hundraðtals framløgur um nærum øll hugsandi evni viðvíkjandi Arktis á stevnuni. Granskarar, politikarar, vinnulívsfólk o.o. úr mongum av heimsins londum vóru í Reykjavík teir fýra stevnudagarnar og umrøddu og tjakaðust um alt frá minkandi ísinum til nýggju vinnumøguleikarnar í hesum enn óspilta partinum av knøttinum.

Løgmaður á palli

Franski forsetin á palli

PARIS2015
UN CLIMATE CHANGE CONFERENCE
COP21·CMP11

REYKJAVÍK • ICELAND
ARCTIC CIRCLE
2015
OCTOBER 16 - 18

ArcticCircle.org
ARCTIC CIRCLE
ArcticCircle.org

ARCTIC CIRCLE
2015
OCTOBER 16 - 18
PARIS2015
COP21-CMP11

ARCTIC CIRCLE

REYKJAVIK, ICELAND
FRIDAY, OCTOBER 16, 2015
ARCTIC CIRCLE
PARIS2015
COP21-CMP11